**Kunningarskriv – lestrarstuðul í 12 mánaðir til hægri lestur, og upphæddirnar í ferðastudninginum broyttar**

**Lestrarstuðul í 12 mánaðir til teirra, ið lesa hægri lestur**

Áður hevur verið galdandi, at bert einsamallir uppihaldarar og aspirantar fáa studning 12. mánaðin í útbúgvingartíðini.

Frá 1. januar 2018 fevnir henda skipan eisini um tey, ið lesa hægri lestur. Endamálið er at bøta um livikorini hjá teimum, ið lesa hægri lestur. Við hægri lestri skilst tey, sum lesa á hægri lærustovni og styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum.

Broytingin hevur við sær, at lesandi á hægri útbúgvingum og á styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum fáa studningin til livikostnað útgoldnan í juli, sum áður hevur verið undantikin. Mánaðarligi stuðulin er kr. 4.315.

12. mánaðin fevnir eisini um lestrarlán. Tað merkir, at lesandi, ið hava tikið lestrarlán eisini fáa lánið útgoldið í juli, sum áður hevur verið undantikin. Lestrarlánsupphæddin er í mesta lagi kr. 2.419 um mánaðin. Leggjast skal afturat, at 12. mánaðurin er bert galdandi í útbúgvingartíðini, soleiðis at skilja, at um útbúgvingin endar í juni, verður stuðul (studningur og lán) ikki útgoldin í juli.

**Ferðastudningur**

Seinastu árini er marknaðarprísurin á ferðaseðlum lækkaður munandi. Í dag kann ein lesandi keypa ferðaseðil aftur og fram til Danmarkar fyri góðar 1.200 kr. Broytingin í ferðastudninginum uttanlands hevur við sær, at upphæddirnar til lesandi og børn teirra lækka, men kortini samsvara við galdandi ferðaseðlaprísir til lesandi.

Frá 1. januar 2018 eru upphæddirnar fyri ferðastudning hesar:

| | Danmark | Evropa (- Danmark og Grønland | Aðrastaðnis |
|---|---|---|---|
| Lesandi | kr. 1.500 | kr. 3.100 | kr. 4.100 |
| Børn: 0 – 1 ár | kr. 200 | kr. 400 | kr. 600 |
| Børn: 2 – 11 ár | kr. 900 | kr. 1.800 | kr. 3.000 |
| Børn: 12 – 16 ár | kr. 1.500 | kr. 3.100 | kr. 4.100 |

Eins og ásett er í § 15 stk. 3 í lógini, koma broytingarnar eisini at galda fyri verkætlanarstudningin, ið er fyri ferðing millum lond, og kann veitast umsøkjara, ið skrivar størri uppgávur í sambandi við lesnað, er í starvsvenjing ella uppiheldur seg á øðrum lærustovni sum part av útbúgvingini.